## Sands Skúli

# Lærarar

**Søkt verður eftir 2 lærarum í føst størv frá 1. august 2008 í Sands skúla.**

Søkt verður eisini eftir 2 lærarum til tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/2009 vegna avlopstímar og niðursetta tíð. Annað starvið er fulltíðarstarv og hitt eru avlopstímar. Endaliga tímatalið til hesi størv verður sett í september.

Í Sands skúla komandi skúlaár verða 55 næmingar og 8 lærarar. Nýggjur skúli er í gerð, sum verður liðugur um árskiftið 2008/09. Skúlin verður bygdur í einari hædd, og har verður rúmligt inni. Skúlin verður ein nýmótans skúli við m.a. ektroniskum talvum.

**Søkt verður eftir lærara sum m.a.:**
- Undir ábyrgd leiðslunar og í samstarvi við lærarir skúlans taka lut í dagliga virksemi skúlans.
- Eru fús at taka á seg tær uppgávur og avbjóðingar, ið eru á skúlanum.
- Eru við til áhaldandi at menna skúlan.
- Duga at samstarva.
- Kunnu átaka sær: ábyrgd av ítrótti, handverk/list, Náttúru/tøkni, enskt, heimstaðarlæru og telduundirvísing. Allar lærugreinar eru hjá 1. – 5. Flokki.

**Førleikakrøv:**
Tey, ið sett verða, skulu helst hava læraraútbúgving, linjugreinar og aðrar møguliga arbeiðsroyndir.

Starvið verður lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 29.2. Størvini verða sáttmálasett, uttan so, at tann, sum settur verður er tænastumannasettur lærari frammanundan.

**Umsóknir:**
Umsóknir við viðmælum, avrit av prógvum o.ø. skulu vera skúlaleiðaranum í hendi seinasta lagi 24. Juni 2008 kl. 12.00.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Kristian Højsted, á telefon 361623 ella 252854.

**Sands Skúli**
**210 Sandur**

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!




# Størv í Viðareiðis Skúla

**Søkt verður eftir lærarum og stuðulsfólki til Viðareiðis skúla skúlaárið 2008/09.**

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2008:**
- 1 lærara í fast starv fulla tíð
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv fulla tíð
- 1 lærara til umleið 14 tímar um vikuna (vegna avlopstímar, lækkað tímatal og serligan tørv. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sep.)
- einum stuðli við pedagogiskari ábyrgd 20 tímar um vikuna. Uppgávan er at virka sum stuðul hjá næmingum við serligum tørvi.

**Tey, ið sett verða skulu:**
- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær at undirvísa í:
- føroyskum, donskum og enskum
- støddfrøði, náttúru/tøkni og lívfrøði
- kristni og søgu
- handaverki og list
- tónleiki og ítrótti
- tímar vegna serligan tørv
- vera flokslærari

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**
Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Stuðulsstarvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis skúli** hevur komandi skúlaár 50 næmingar og 7 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid

## Skrivstovuhølir til leigu

Skrivstovuhølir til leigu frá 1. august. Hølini standa sentralt í Tórshavn, og eru umleið 100 m². Góð parkeringsviðurskifti.

Nærri upplýsingar fáast á tlf. 310236/552504

**Vestmanna Skúli**
Toftavegur 12 · FO - 350 Vestmanna · Føroyar
Tlf. 470100 · Fax: 470101 · vestmanna@skulin.fo

# LÆRARASTØRV í Vestmanna Skúla

**lýst leys til setanar frá 1. august 2008.**

**Søkt verður eftir 5 lærarum, einum í føstum fulltíðarstarvi, trimum í tíðaravmarkaðum fulltíðarstarvi og einum í tíðaravmarkaðum parttíðarstarvi, (um 20 tímar/vikuna)**
- fyri eftirløntan lærara, lærarar í farloyvi, lækkað tímatal, stuðulstímar og avlopstímar

**Søkt verður eftir lærarum, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum lærugreinum/lærugreinaøkjum:**
- ítrótt og svimjing, dreingir
- føroyskt, týskt, enskt og danskt
- náttúru/tøkni, alisfrøði og evnafrøði
- træ- og jarnsmíð og motorlæru
- tónleik, heimkunnleika, handverk og list
- kristni, søgu og samtíð
- námsfrøðiligar stuðulstímar
- tímar vegna serligan tørv og standa fyri lesi- og rokniroyndum
- vera flokslærarar

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

Tó kunnu læraralesandi, ið lúka prógv í summar, eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er Vestmanna Skúli. Tey, ið sett verða, eiga at tola broytingar starvinum viðvíkjandi.

Størvini verða lønt í lønarflokki 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tíðaravmarkaðu størvini verða sett fyri skúlaárið 2008 - 2009.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 16. juni 2008, kl. 16.00.

Fleiri upplýsingar um størvini fært tú við at ringja til Vestmanna Skúla tlf. 470100, fartlf. 230100, til varaskúlastjóran fartlf. 230101 ella við at senda teldupost til skúlastjóran olavur.winther@skulin.fo

**Vestmanna Skúli** hevur komandi skúlaár umleið 192 næmingar og um 22 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/ves/. Vestmanna Skúli er kendur fyri at vera næmingavinarligur og grønur skúli. Skúlin arbeiðir í løtuni við hesum evnum: at menna trivnaðin, byrjanarundirvísingina, samstarvið við vinnulívið og at geva næmingunum fjølbroyttar avbjóðingar.